# – Tíðin gongur so skjótt tá

**Tað er helst ikki á hvørjum degi, at ein lutvíst ókendur føroyskur listamaður fær góð ummæli í einum so fjarskotnum landi sum Finlandi. Henda heiður fekk klaksvíkingurin, Símun Poulsen í farna mánaði. – Tað var sera stuttligt at vera við á framsýningini, sigur hann**

LISTAMAÐUR
*Snorri Brend*
*snorri@sosialurin.fo*
*Myndir: Jens Kristian Vang*



**Klaksvík:** - Mær dámar sera væl at mála og tekna, sigur 48 ára gamli klaksvíkingurin.

Símun er blíður, men kortini fáorðaður. Tað er týðiligt at skilja - og síggja! – at málningalistin er hansara stóri kærleiki.

Í stuttari samrøðu við Sosialin sigur hann eisini, at hann hevur málað, líka síðani hann var lítil. Símun hevur eitt serstakt handalag, so at hann fær tær beinu strikurnar heilt beinar, uttan lineal ella onnur hjálpartól.

*»Einaferð málaði eg ein kálv, sum æt Judas«*

Hann hevur luttikið á ymiskum framsýningum, bæði í Klaksvík, Havn og nú seinast í Finlandi, har listafólk úr øllum Norðurlondum tóku lut.

- Eg máli bara, og so gongur tíðin so skjótt, slær Símun fast.

Myndevnini eru rættiliga ymisk – frá húsum til fuglar, til blómur, fiskar og skip.

Hesi myndevnini síggjast aftur her á verkstaðnum, og vóru eisini at síggja á hesi rættiliga stóru framsýningini í Finlandi í mai mánaði, har menningartarnað úr fleiri londum tóku lut.

### Kettan Olga og kálvurin Judas

Hjá kendum og ókendum listafólkum er mannagongdin helst hin sama:

Tey fáa brádliga eina inspirasjón, og so má hetta bara festast ella málast á blað ella á lørift.

- Tað er tað sama hjá mær: Eg fái eitt hugskot, og so máli eg tað bara!, sigur Símun.

Onkutíð eru hesi myndevnini slík sum eru kend í hansara umhvørvi, til dømis kettuna Olgu, sum tey hava heima við hús.

Men soleiðis er ikki altíð: Onkutíð hevur hann málað persónar í kistu og í himlinum.

- Einaferð málaði eg ein kálv, sum æt Judas, sigur Símun við einum brosi.

### Í sjónvarpi og bløðum

Fyri eitthvørt listafólk hevur tað sín týdning at vísa verk síni fram í heimlandinum. Men tað man vera ein serligur heiður at vísa verk síni fram í útlondum.

Henda møguleikan fekk Símun eisini á eini framsýning í

*»Eg máli bara, og so gongur tíðin so skjótt«*



*Símun Poulsen luttekur í hesum døgum á eini stórari framsýning í Finlandi á einum listardepli fyri menningartarnað. Her hevur hann 18 verk við, sum síggjast hanga á vegginum*